# 🇫🇴 Úrvalsíðkarar - Royndir og Próvtøkur

Um royndir ella próvtøkur liggja samstundis sum landsliðsferð, eru hesar loysnir.

---

## 📅 Flyta royndir ella ítrótt

### Flyta ítróttin

Ítrótturin skal hyggja at um tað er møguligt at tann íðkarin/næmingurin sum skal til roynd, kann leggja ferðingina soleiðis til rættis at tað ikki ávirkar royndir ella próvtøkur.

### Flyta próvtøkur

Næmingurin setur seg í samband við **ÍSF-vegleiðaran** á skúlanum, sum síðani søkir um at flyta próvtøkuna hjá próvstovuni, soleiðis at næmingurin ikki skal til roynd tað tíðarskeiði landsliði er burtur. Hetta skal avgreiðast **áðrenn 15. apríl.** Skema fyri próvtøkur verður **alment 15. mai**.
Flyting av próvtøku er ikki altíð møgulig.

### Flyta ársroyndir

Næmingurin setur seg í samband við **ÍSF-vegleiðaran** á skúlanum, sum síðani kannar møguleikan at tillaga royndirnar soleiðis at næmingurin ikki skal til roynd tað tíðarskeiði landsliði er burtur. Hetta skal avgreiðast **áðrenn 8. mai.** Flyting av ársroynd er ikki altíð møgulig.

Um einki ber til at flyta: So kunnu aðrar loysnir, t.d. sjúkraroynd ella online roynd, hugsast.

---

## ✅ Aðrir møguleikar

**Sjúkraroynd** er ein møguleiki, um tú ert burtur við landsliðnum tá vanliga royndin er. Sig skúlanum frá í góðari tíð – læknaváttan er ikki kravd, og hetta ávirkar ikki húgvu ella víðari lesnað, tó verður endaliga prógvið ikki útskrivað fyrr enn sjúkraprótøkan er avgreidd.

**Online royndir** kunnu eisini bera til, men krevja góðar umstøður, trygt internet og samskipan millum skúlan og ítróttin. Tað veldst um hvørja roynd og hvørjar tekniskar treytir eru. Set teg í samband við **ÍSF-vegleiðaran** á skúlan í góðari tíð.

Undirvísingarstýrið · ÚRVAL · Ítróttasamband Føroya – The Faroese Confederation of Sports and Olympic Committee
Miðnám í Vestmanna · Glasir Tórshavn College · Miðnám á Kambsdali · TSK · Miðnám í Suðuroy